


Aðalfundur felagsins verður í ÍSF-húsinum týskvøldið 26. mai 2009 kl. 19.00. Skrá smb. lóg felagsins.

**Nevndin**

---

## KOYRIKORT?

### EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið og RF-Skeið byrjar mikudagin 13. mai 2009 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Andrea Isaksen | 211687 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

---



# Bilur til sølu

**Toyota Yaris Verso 1.3 árg. 2001.**
**Km 165.500. Prísur 45.000**

PLÁTUVERKSTAÐIÐ

v/Glenn Perdomo · tel 32 17 78 / 22 17 78 · www.plv.fo

---

## TVINGSILSSØLA

**Týsdagin tann 26. mai 2009, kl. 9:15** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn hildin nýggj tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 102a, Søldarfjørður, hægsta boð á fyrstu auktión var 5.000 kr. (AS nr. 2-1/2009).

Matr. nr. 102a, Søldarfjørður, ið liggur Oman á Sand 15, er ein vinnubygningur og sambært tryggingarskjalinum fyri bygningin er bygda økið 564 m² í tveimum hæddum. Samlaða grundøkið er 2.294 m². Bygningurin hevur verið nýttur til HVS-innlegging, blikksmíð, smásølu av jarnvørum og framleiðslu.

Bygningurin er annars innrættaður soleiðis:

Miðhædd: Trappugongd upp til miðhæddina. Á miðhæddini er eitt handilshøli, tríggjar skrivstovur, goymslurúm, køkur, musikrúm, vesi og gongd.

Veghædd: Ein stór smiðja, garasja og køkur.

Bygningurin er stoyptur og partvís beklæddur. Vindeyguni eru plastikk og takið er av stáli.

Tvingsilssølan er umbiðin av Ingi Højgaard, adv., v/Mimi Steintórsdóttir, adv.ft., Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 8800808), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
**tann 12. mai 2009**

---

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Innlendismálaráðið bjóðar saman við Norðurlendska Ráðharraráðnum til kunnandi tiltak um fyrireikingarnar til eina nýggja altjóða veðurlagsavtalu. Norðurlond taka virknan lut í fyrireikingunum. Settur er ein norðurlendskur COP15-bólkur, hvørs endamál er at rudda slóð fyri einari framsóknari veðurlagsavtalu í Keypmannahavn við Danmark sum verti. Her heima er landsstýrið í holt við at fyrireika tiltøk at minka um útlátið av veðurlagsgassum so til ber hjá Føroyum at taka undir við nýggju Keypmannahavnavtaluni.

# INNBJÓÐING

## ALMENNUR FUNDUR

um eina nýggja altjóða veðurlagsavtalu í Norðurlandahúsinum 19. mai kl. 13.00-16.00

### SKRÁ

| | |
|---|---|
| **13.00-13.30** | Annika Olsen, landsstýriskvinna setir fundin og umrøður føroysku fyrireikingarnar til eina nýggja veðurlagsavtalu. |
| **13.30-14.15** | Harald Dovland, norska umhvørvisráðið og næstformaður í arbeiðsbólkinum hjá ST um framtíðar skyldur at minka um útlátið av veðurlagsgassum, umrøður støðuna í altjóða veðurlagssamráðingunum fram móti Keypmannahavn. |
| **14.15-14.40** | Steðgur. |
| **14.40-15.05** | Lars Hasselager Olsen frá danska Energistyrelsen og Camilla Mørk frá danska veðurlags- og orkumálaráðnum umrøða samráðingargongdina í IMO um útlát av veðurlagsgassum frá skipum. |
| **15.05-15.25** | Kate Sanderson, Uttanríkisráðið, umrøður tilgongdina til altjóða veðurlagsfundin í Keypmannahavn. |
| **15.25-15.40** | Kaj Leo Johannesen, løgmaður endar fundin. |
| **15.40-16.00** | Høvi er hjá fjølmiðlum at seta fyrilestrarhaldarum spurningar. |

*Tiltakið er ókeypis, men neyðugt er við tilmelding til kristvorp@imr.fo í seinasta lagi 18. mai á middegi.*

norden
NORÐURLANDAHÚSIÐ

---

# SKRIVSTOVUFÓLK TIL LØNJAVNINGARSTOVUNA

***Umsóknarfreist***

Mánadagin 18. mai 2009 kl. 12.00.

**Les meira á fisk.fo**

Fiskimálaráðið

SENDISTOVAN